

# Lavrov givið avboð

Russiski uttanríkisráðharrin, Sergei Lavrov, ætlar sær ikki á fund hjá verjusamgonguni NATO, sum eftir skránni skuldi umrøða viðurskiftini millum samgonguna og Russland seinni í mánaðinum. Avgerðin hjá Lavrov er eftir øllum at døma svar upp á avgerðina hjá NATO at vísa tveimum russiskum diplomatum burtur. Fundurin hjá NATO verður í Bruxelles tann 19. mai og er tann fyrsti síðani russisku innrásina í Georgia í august í fjør. Ætlanin var, at Sergei Lavrov skuldi hitta amerikanska uttanríkisráðharran, Hillary Clinton, í sambandi við fundin.

# INNI 10 ár og nýtt búmerki

**Húsameklarafyritøkan INNI varð sett á stovn í august 1998 og hevur sostatt meira enn 10 ár á baki. Í hesum sambandi fær fyritøkan nýggjan grafiskan samleika (búmerki) og nýggja heimasíðu, sum verður kunngjørdur á móttøku í morgin.**

TÍÐINDASKRIV

Træið í gamla búmerkinum er burtur, og við nýggja búmerkinum leggur INNI seg nærri upp at verandi búmerki hjá móðurfelagnum EIK Banki P/f. Eitt nú hevur nýggja búmerkið hjá Inni sama bókstavasnið, sum varð ment til Eik, tá Eik skifti navn og fekk nýggjan grafiskan samleika í 2007.

Nýggja búmerkið hjá INNI er reint og einfalt, og lýsir eitt virki í framburði. Grái liturin gevur eina fatan av stabiliteti og royndum, og bjarti, grøni liturin lýsir tryggleika, smidligar mannagongdir, góða tænastu og broytingarsinni til frama fyri kundan.

Heimasíðan er gjørd samsvarandi nýggja grafiska samleikanum. Heimasíðan hjá INNI er ein tann mest vitjaða heimasíðan í Føroyum, og er snúningsdepilin fyri virkseminum hjá fyritøkuni. Á heimasíðuni er stórur dentur lagdur á, at brúkarin skjótt og lætt fær kunna seg um ognirnar, sum eru til sølu um alt landið.

Í 2007 keypti P/F INNI Sethúsasøluna Sp/f. Við at leggja fyritøkurnar saman fingust synergiir burturúr, ið bæði eru til fyrimuns fyri kundarnar og fyritøkuna.

Hesi 10 árini er sethúsamarknaðurin munandi broyttur. Vanligt var at byggja ella keypa sær eini hús fyri lívstíð, men soleiðis er ikki longur. Nú keypa og selja fólk síni hús alt eftir, hvussu tørvurin hjá familjuni broytist.

P/F INNI hevur ment seg væl øll árini. Í dag starvast 6 fólk í Inni, sum hevur ein munandi part av føroyska bústaðarmarknaðinum.

P/F INNI hevur søluskrivstovur í Havn, Saltangará og Klaksvík.

Almenn móttøka verður í P/F INNI í sambandi við, at nýggja búmerkið verður avdúkað. Móttøkan verður í hølunum hjá P/F INNI hósdagin 7. mai 2009 frá kl. 15-17.




*Hannelena Mittún, stjóri í Inni saman við tveimum av starvsfólkunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*


# Grannskoðaranæmingar

**Fíggjarkreppa og niðurgangstíðir skapa trupulleikar, men eisini nýggjar møguleikar og stórar avbjóðingar. Um tú vilt verða við til at møta hesum avbjóðingum, so hevur tú møguleikan her. Grannskoðaravirkið INPACT søkir næmingar, ið hava hug og hegni at útbúgva seg innan roknskap og grannskoðan.**

INPACT er ein tænastufyritøka, hvørs kjarnuøki er at veita vitanargrundaðar tænastur serliga til vinnulívið, men eisini almenna geiran. INPACT byggir sína framtíð á førleikarnar hjá starvsfólkunum. Tað er tí fyritreyt fyri víðari menning, at vit hava dugnalig og væl útbúgvin starvsfólk.

Um tú hevur evnini, so vilja vit nýta tað tilfeingi, sum skal til, fyri at tú kanst fáa eina av heimsins bestu praktisku og ástøðiligu útbúgvingum innan økið.

Vit ímynda okkum, at tú byrjar á skrivstovuni hjá okkum 1. august 2009.

Heilt frá byrjan verður tú við til at loysa grannskoðarauppgávur fyri kundar okkara, fyrstu tíðina undir leiðslu av royndum grannskoðara. Vit leggja dent á, at tú skjótt megnar at arbeiða sjálvstøðugt við smærri uppgávum, men eisini sum partur av einum toymi. So hvørt sum tú kemur longri í útbúgvingini og royndirnar verða fleiri, vaksa avbjóðingarnar og ábyrgdin samsvarandi.

Um somu tíð byrjar ástøðiligi parturin av útbúgvingini, har tú við síðuna av vanliga arbeiðnum fert undir at lesa 1. part av HD. Harumframt luttekur tú á skeiðum, ið vit skipa fyri saman við fakligu samstarvsfeløgum okkara.

Tú ræður sjálv/-ur fyri, hvussu stóran part av útbúgvingini tú tekur, men vit mæla til, at tú í minsta lagi nemur ástøðiliga útbúgving á bachelorstøði.
Um hugurin er til tess, kanst tú halda fram við at lesa cand. merc.aud. og taka útbúgvingarrøðina, sum krevst fyri at kunna gerast statsautoriseraður / løggildur grannskoðari.

**Vit leggja dent á, at tú hevur persónligar eginleikar sum:**
- evni at menna teg við uppgávunum
- vilja og evni til at arbeiða sjálvstøðugt
- søkir ábyrgd og ávirkan heldur enn sleppa tær undan

**Førleikar:**
- Miðnámsútbúgving, so sum HH, fiskivinnuútbúgving, student ella annað
- Tekur tú prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja
- Enskt í skrift og talu
- Góðan telduførleika
- Fólk við bankaútbúgving ella líknandi eru eisini vælkomin at søkja

Umhugsar tú at søkja og vilt hava meira at vita, ella ivast tú bara í onkrum, kanst tú ringja til okkara og spyrja eftir Heina Thomsen, statsaut. revisor (tlf. 794707), ella Jógvan Joensen, løggildur grannskoðari (tlf. 794722).

Er hetta nakað fyri teg, kanst tú senda okkum eina umsókn við CV.

Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT
løggilt Grannskoðaravirki
R.C. Effersøesgøta 26
Postbox 191
FO-100 Tórshavn

Teldupostur: inpact@inpact.fo

Sp/f Grannskoðaravirkið
INPACT

--------------------

Limur í INPACT AUDIT Ltd.
An International Network of Accounting and Auditing Professionals.

INPACT Audit Limited is registered in the UK as INPACT Audit Limited, a private company limited by guarantee. INPACT Audit Limited is a member of the Forum of Firms, an association of international networks of accounting and auditing firms that perform transnational audits.

IKON // TEL 320 870

Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT · løggilt grannskoðaravirki · R.C. Effersøesgøta 26 · Tórshavn · Tel 314700 · Fax 313815 · inpact@inpact.fo · www.inpact.fo